## UTTAN ÚR HEIMI



*Sambært Expressen ætlaðu yvirgangsmenn at søkja at Hvítu Húsunum í Washington.*

# Ætlaðu at søkja at Hvítu Húsunum

**Tríggir bretar, sum sita í varðhaldi í London, høvdu lagt ætlanir um at søkja at Hvítu Húsunum í Washington, skrivar eitt svenskt blað.**

YVIRGANGUR
*Árni Joensen:*
*fartekst@mail.dk*

Teir tríggir bretarnir vórðu tiknir um somu tíð, sum fleiri fólk vórðu tikin í Danmark og Bosnia, tí illgruni er um, at tey høvdu ætlanir um yvirgang.

Í Bosnia hevur løgreglan tikið ein 18 ára gamlan mann, sum hevur svenskan ríkisborgararætt. Svenska blaðið Expressen skrivaði í gjár, at maðurin hevur havt samband við teir tríggjar menninar, sum vórðu tiknir í London, og at teir høvdu fyrireikað atsóknir at Hvítu Húsunum og Kongressini í Washington. Sambært blaðnum fann bosniska løgreglan myndir av Hvítu Húsunum heima hjá svianum.

Tann 18 ára gamli maðurin hevur búð í Svøríki, men sambært bosnisku myndugleikunum flutti hann til Bosnia, har hann fór upp á ein bólk, sum hevur havt samband við umboðsmannin hjá al-Qaeda í Irak, Abu Musad al-Zarqawi.

Í Danmark sita sjey fólk í varðhaldi. Danska løgreglan hevur higartil sagt, at tey eru undir illgruna fyri at hava havt ætlanir um yvirgang í Evropa.

# Álvarssamar ákærur ímóti amerikanska herinum

**Tað hevur leingi ljóðað, at amerikanski herurin brúkti kemisk evni og brandbumbur ímóti sivilfólki undir álopinum á irakska býin Fallujah í fjør. Ein italsk sjónvarpssending styrkir illgrunan.**

IRAK
*Árni Joensen:*
*fartekst@mail.dk*

Tað var í november í fjør, at amerikanskir hermenn og irakska tjóðarhirðin lupu á býin Fallujah, har uppreistrarmenn hildu til. 300.000 fólk flýddu úr býnum, og tey fyrstu sluppu ikki heimaftur fyrr enn seks vikur seinni. Tá var allur býurin í sori.

Tey, sum hava gjørt italsku sjónvarpssendingina um álopið, vísa á, at umheimurin slapp ikki at fylgja við bardøgunum í býnum. Bara tíðindamenn, sum amerikanska herleiðsloan hevði góðkent, sluppu við hermonnunum. Tað er ein orsøk til, at sendingin hevur fingið heitið "Tað loyniliga hópmorðið".

Jeff Engelheart var ein av teimum amerikonsku hermonnunum, sum vóru við í bardøgunum í Fallujah.

-Vit fingu at vita, at øll, sum gingu, tosaðu ella andaðu, skuldu roknast sum fíggindar, sigur hann við italska sjónvarpið Rai. Sjálvur lýsir hann álopið sum eitt hópdráp. Hann greiðir frá, at ungdómar vóru roknaðir sum lóglig mál, og at hermenninir fingu boð um at vera varnir, tí herurin brúkti hvítt fosfor í bardøgunum inni í býnum.

-Eg sá brend lík, menn, kvinnur og børn. Tá fosfor spreingist, verður tað sum eitt skýggj, og øll, sum eru minni enn 150 metrar burturi, verða brend, sigur fyrrverandi hermaðurin.



### Brúktu fosfor

Í sjónvarpssendingini eru fleiri myndir av fólki, sum doyðu í Fallujah. Andlit teirra eru avskeplað, men klæðini eru heil.

Hetta er ikki fyrstu ferð, at amerikanski herurin verður lagdur undir at hava brúkt kemisk evni í bardøgunum í Fallujah. Longu tann 10. november í fjør ljóðaði, at amerikanararnir brúktu kemisk evni og eiturgass í bardøgunum. Síðani hava fleiri vitni greitt frá, at amerikonsku hermenninir brúktu brandbumbur og hvítt fosfor ímóti sivilfólki í býnum, men tað avsannaði amerikanska stjórnin. Hon viðgekk tó, at herurin hevði brúkt hvítt fosfor í Fallujah, men bara til ljós og ikki til álop á sivilfólk.

Tann italska sjónvarpssendingin byrjaði við myndum, sum vístu ræðsluslignin børn leita sær skjól í Vietnam í 1972. Tað vísti seg, at amerikanararnir brúktu napalmbumbur ímóti sivilfólkinum har, og síðani hevur altjóða samfelagið sett forboð fyri at brúka kemisk vápn.

## Høgramaður fyri rættin

Tann sera høgrasinnaði týskarin Ernzt Zundel, sum millum annað heldur uppá, at nazistarnir myrdu ongar jødar undir seinna heimsbardaga, kom fyrradagin fyri rættin í býnum Mannheim.

Týska løgreglan hevur leitað eftir honum í fleiri ár. Ernzt Zundel hevur rikið forlagið Samisdat Publishers, sum er kent fyri at geva út nazistiskt propagandatilfar, og tað hevur eisini fleiri útgávur, sum eru í stríð við týsku lógina um rasuskilnað, skrivar AP. At hann ikki er einsamallur um sínar áskoðanir sást í rættinum, tí fleiri av hansara stuðlum møttu í rættarhølinum at vísa, at teir styðja hann.

Jødiskir leiðarar í Týsklandi fegnast um, at Ernzt Zundel endiliga kemur fyri rættin. Verður hann funnin sekur, kann hann fáa upp í fimm ára fongsul.

Ernzt Zundel hevur búð í Kanada í mong ár. Hann hevur fleiri ferðir søkt um at fáa kanadiskan ríkisborgararætt, men svarið hevur verið nei hvørja ferð. Fyri einum hálvum ári síðani gjørdu kanadisku myndugleikarnir av at útflýggja Týsklandi hann.

## Bergen vil hava oljumessu

Borgarstjórin í Bergen, Herman Friele, hevur sett sær fyri, at Bergen skal skipa fyri einari av heimsins størstu oljumessum í 2007.

Talan er um altjóða messuna Deep Offshore Technology. Í ár er stevnan í brasilska býnum Vitoria nærhendis Rio de Janeiro, og tí er norski borgarstjórin farin hagar fyri at royna at sannføra fyrireikararnar um, at messan eigur at verða í Bergen í 2007. Sambært borgarstjóranum verður Bergen til reiðar at hýsa messuni, tá ein nýggj høll, sum skal byggjast til endamálið, er liðug.

Tey bæði stóru norsku oljufeløgini, Statoil og Norsk Hydro, taka undir við hugskotinum hjá Bergen-borgarstjóranum. Eins og borgarstjórin vísa tey á, at norsk tøkni er í oddinum, tá tað snýr seg um oljuvinnu í veðurringum økjum, og harafturat eru stórar útbyggingar í Bergen í løtuni.

## Arnold ikki so tryggur

Tað er minni enn so víst, at tann kendi guvernørurin í Kalifornia, Arnold Schwarzenegger, verður afturvaldur.

Schwarzenegger hevur leingi fyrireikað ein lógarpakka, sum millum annað skuldi skerja lønina hjá teimum alment løntu, men hesum vildu veljararnir í Kalifornia ikki vita av. Av teimum fýra lógunum, sum vóru í pakkanum, vórðu tríggjar vrakaðar, og tað er heldur ikki víst, at tann seinasta verður samtykt.

Tey alment løntu í Kalifornia hava mótmælt ætlanini hjá guvernørinum. Tað er heldur ikki so løgið, tí millum annað segði eitt av lógaruppskotunum, at guvernørurin skuldi hava rætt til at skerja lønarútreiðslurnar, um inntøkurnar hjá statinum vóru minni enn væntað. Tað vildu tey alment løntu ikki hoyra talan um. Tann eina ferð so sterki Schwarzenegger er ikki so sterkur longur.

## Taliban herðir mótstøðuna

Leiðarin hjá tí falna Taliban-stýrinum í Afghanistan, Mohammed Omar ella mullah Omar, sum hann vanliga verður róptur, eggjar nú monnum sínum til at herða mótstøðuna ímóti teimum útlendsku hermonnunum í landinum.

Boðini vórðu send í afghanska sjónvarpinum Ariana tann 5. november, og sambært sjónvarpsleiðsluni var tað eitt umboð fyri Taliban, sum handaði sjónvarpinum upptøkuna. Har segði mullah Omar, at Taliban fer ikki einans at herða mótstøðuna ímóti teimum fremmandu hermonnunum, men at tann afghanski stjórnarherurin skal eisini fáa harðari mótstøðu.

Teir báðar seinastu mánaðarnar hevur Taliban gjørt fleiri álop á teir útlendsku hermenninar har suðuri í Afghanistan. Í flestu førum eru tað teir amerikonsku hermenninir, sum standa fyri skotum.

USA hevur lovað stóra finningarløn, verður mullah Omar tikin, men enn hevur eingin avdúkað, hvar hann fjalir seg.